# Dupultskattaavtala




*Báður Nielsen, landsstýrismaður á oljuráðstevnu í Norðurlandahúsinum*

**– Tá eg fór undir málið at fáa eina dupultskattaavtalu við Bretland helt eg, at tað fór at taka lítla tíð men tað havi eg lært, at tá tað kemur til avtalur millum lond, so tekur tað tíð at fáa tær uppá pláss sigurd Báður Nielsen, landssstýrismaður, sum tó er bjartskygdur, nú ein slík avtala er við at koma undir land**

OLJUSAMVINNA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Nógv eftirspurda dupultskattaavtalan við Bretland er nú so smátt við at koma undir land. Bárður Nielsen, landssstýrismaður í fíggjarmálum var við sum áhoyrari á stóru oljuráðstevnuni herfyri. Hann kundi tá koma við góðu tíðindunum til blaðið, at nógv umrødda dupultskattaaavtalan gerst veruleiki innan fyri eitt ár ella so.

Tað hevur í eina tíð verið tætt samskifti millum londini, ið bæði hava stóran áhuga í at fáa eina dupultskattaavtalu, soleiðis at læftari verður at samstarva og arbeiða hjá hvørjum øðrum. Tað er serstakliga oljuvinnan, sum royndir at skundir undir eina slíka avtalu, tí hon fer at gera tað rudduligari fyri allar partar.

## Uppskot

Uppskot eru send aftur og fram og skulu viðgerast av báðum pørtum. Enn eru nøkur ting, sum skulu fáast uppá pláss. Ein embætisbólkur er settur at gera tilfarið endaliga klár, og síðani verður ein fundur á politiskum stigi, áðrenn málið fer í tingini, parlamentini í báðum londum. Báður Nielsen vónar, at viðgerðin í tingunum kann vera í heyst ella seinni, soleiðis at ein endalig avtala kann skrivast undir tíðliga næsta ár ella í seinasta lagi móti sumri 2007.

– Bretar hava leingi ver-